# Heimasíður – partur av corporate branding

*Allan Dalsgarð, viðskiftastjóri á Reproz, sigur, at henda skipan verður nýtt um allan heim, og at fleiri enn 30 forritarar regluliga menna hana. Kring heimin eru fleiri enn 1400 stórar privatar og almennar fyritøkur, sum dagliga n‡ta DynamicWeb skipanina*

**Samskiftisfyritøkan Reproz og KT-virkið Com-Data eru farin í samstarv fyri at veita kundunum ta bestu samskiftis- og tøknifrøðiligu heimasíðuloysnina. Reproz og Com-Data bjóða føroyskum fyritøkum kendu CMS heimasíðuskipanina, DynamicWeb**

KT-VINNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

– Við samstarvinum seta vit viðskiftafólkið í miðdepilin, sigur Christian Nagata, stjóri. Hann sigur, at samstarvið tryggjar kundanum eina langtíðarloysn, har hugsað verður um tørvin á effektivisering, corporate branding, eins og um fremstu tøknifrøðina.

## Heimskend skipan

Allan Dalsgarð, viðskiftastjóri á Reproz, sigur, at henda skipan verður nýtt um allan heim, og at fleiri enn 30 forritarar regluliga menna hana. Kring heimin eru fleiri enn 1400 stórar privatar og almennar fyritøkur, sum dagliga nýta DynamicWeb skipanina. Av føroyskum fyritøkum, sum nýta hesa skipan, kunnu til dømis nevnast SEV, sum umframt at marknaðarføra seg við heimasíðuni, eisini hevur knýtt skipanina saman við aðrar skipanir í fyritøkuni. Sostatt kann SEV á heimasíðu sínari bjóða viðskiftafólkunum at síggja teirra saldo, biðja um kontoavrit, boða frá flyting ella síggja nýtsluna v.m. Smyril-Line bjóðar kundum sínum at bíleggja ferðir við Norrønu beinleiðis á heimasíðuni, og viðskiftafólk hjá Føroya Sparikassa kunnu á heimasíðuni logga seg á heimagreiðsluna, limagreiðsluna v.m.

Í fleiri ár vóru tað einans KT-fyritøkur, sum seldu heimasíðuloysnir. Heini Hansen, sølustjóri á Com-Data sigur, at áður varð ein heimasíða einans hildin at vera ein tøknifrøðilig loysn, og hugsað varð ikki so nógv um, at hon eisini var andlitið úteftir.

– Nú vita vit, at fleiri og fleiri viðskiftafólk fyrst leita sær kunning um fyritøkuna júst á heimasíðuni. Tí verður alt størri dentur lagdur á sniðgeving og innihald, og ikki minst hava myndir og grafikkur sera stóran týdning, eins og at heimasíðan er brúkaravinarlig, løtt at dagføra og so framvegis, sigur Heini Hansen.

Í dag verða nógv ymisk sløg av heimasíðum bjóðaðar fyritøkum í Føroyum. Talan kann vera um heilt einfaldar loysnir, men eisini ber til at fáa meira umfatandi CMS-heimasíðu loysnir, sum kunnu merkja effektiviseringar fyri fyritøkuna.

## Kann býtast upp í tríggjar bólkar

Ymisku loysnirnar við Dynamic Web kunnu býtast upp í tríggjar bólkar:

– heimasíður, sum bert hava til endamáls at marknaðarføra fyritøkuna, til dømis at kunna um søguna hjá virkinum, upp- og afturlatingartíðir, starvsfólk o.s.fr.
– heimasíður, sum eisini eru CMS skipanir – Content Management Systems. Slíkar loysnir geva fyritøkuni eina heimasíðu, sum myndar hana úteftir, umframt eina sokallaða interna heimasíðu til starvsfólkið (summi kalla hetta teirra intranet) og eina back-office skipan, sum ger tað lættari at halda skil á tí, ið er á heimasíðuni. Mannagongdir, journalisering og brúkarastýring eru eisini partar av slíkum skipanum. Dagføring er sera einføld og verður vanliga gjørd av starvsfólkunum í virkinum.
– í triðja bólkinum eru loysnirnar, sum muna mest hjá fyritøkunum. Umframt at vera sokallaðar CMS-loysnir, kunnu verandi telduskipanir hjá virkinum verða knýttar saman við heimasíðuskipanini. Úrslitið er sparing í innanhýsis fyrisiting, tí kundin so at siga avgreiðir seg sjálvan við at logga á skipanir umvegis heimasíðuna. Sostatt veitir fyritøkan í hesum føri eina sera góða kundatænastu, tí atgongd er altíð til tænasturnar.

Ráðgevar hjá Reproz og Com-Data verða at hitta á sama bási á KT2006 stevnuni, har meira fæst at vita um DynamicWeb heimasíðuloysnina. Reproz og Com-Data fara at skipa fyri fyrilestrum á KT-stevnuni í Norðurlandahúsinum.

miðlahúsið
í Vágsbotni

Sosialurin | TÓRSGØTA 1 · P.O.BOX 76 · FO-110 TÓRSHAVN · TEL 34 18 00
FAX 34 18 01 · POST@SOSIALURIN.FO · WWW SOSIALURIN.FO

Haldið Sosialin
Tekna teg sum haldara nú
450,- um ársfjórðingin
sparið 395,- í mun til leysasølu

950,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(650,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin 341800

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: _____
Bústaður: _____
Postnr.: _____
Bygd/býur: _____
Telefon nr.: _____
Undirskrift: _____

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin
rindar
postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn